## Keane áhugaður í Arsenal-spælara

Arsenal plagdi at verða stóri fíggindin hjá Roy Keane, tá hann varð liðformaður hjá Manchester United. Nú er Keane venjari fyri 1. deildarfelagið Sunderland, og hann vísir nú áhuga fyri einum av spælarunum hjá Arsenal. Talan er um 18 ára gamla Anthony Stokes, sum í ár hevur verið leigaður til skotska felagið Falkirk. Ungi írin hevur staðið seg sera væl, og hevur skotið 11 mál í 17 dystum. Keane sigur, at hann hugt eftir Stokes, og tað kann væl verða, at felagið fer at bjóða upp á hann.

## Speed við 500 dystum

Walisarin Gary Speed spældi um vikuskiftið sín dyst nummar 500 í ensku Premier League. Hann er fyrsti spælarin, sum kemur upp á hetta tal. Gary Speed hevur spælt fyri fleiri feløg, Newcastle, Leeds og Everton, og nú er hann at finna á miðvøllinum hjá Bolton. Næstur á listanum er málmaðurin David James við 454 dystum, og síðani kemur enn ein walisari, Ryan Giggs hjá Manchester United, sum hevur spælt 447 dystir í Premier League.



# Chelsea snávaði á heimavølli




*Lehmann hevði úr at gera í Arsenal-málinum sunnudagin. Her bjargar hann við bringuni roynd frá John Terry*

*Mynd: Scanpix*

**Hóast greiða yvirvág, so gekst sera striltið hjá Chelsea at fáa mál, og so varð um reppið, at Arsenal gjørdist fyrsta liðið, sum vann á Mourinho á Stamford Bridge**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Síðani hann tók við sum venjari í Chelsea, hevur José Mourinho ongan tíð roynt at tapt heimadyst í Premier League. Tað metið stendur framvegis, men tað stóð tó nógv á, tá meistararnir sunnudagin tóku ímóti Arsenal.

Einki forgjørt hevði verið, um Chelsea vann við fleiri málum, men talan var um ein av dystunum, har dýrt keyptu stjørnurnar høvdu meira enn trupult við at finna meskarnar. Lampard, Shevchenko, Ballack og Drogba høvdu allir sínar møguleikar, men tá Lehmann ikki tók sær av hesum, var træverkið í parti við gestunum, sum í sínum lagi stríddust fyri møguleikanum.

Og tað tóktist eisini gav úrslit, tá Flamini bert eitt korter fyri leiklok sendi bóltin í meskarnar. Eftir gott samanspæl við Hleb á miðvøllinum gjørdist fraklendingurin leysur, og við einum góðum skoti sendi hann bóltin inn við stólpan.

Málið noyddi Chelsea at seta enn meira ferð á annars ferðmiklu uppgerðina, og lívlínan kom, tá Essian hamraði bóltin í meskarnar eftir 84 minuttum.

Og framvegis hevði Chelsea orsøk at iðra seg. Í yvirtíðini var træverkið aftur fyri tvær ferðir. Fyrst tá Essien úr tveimum metrum smekkaði til á tværtræið, og síðani tá Lampard rakti innsíðuna av stólpanum, tá hann var fyrstur á retui eftir skotroynd frá Robben.

Og tó at teir enn ikki hava tapt á heimavølli, so misti Chelsea við javnleikinum eitt týðandi fet í oddastríðnum. Við sínum sigri í lokaluppgerðini móti Manchester City hevði Manchester United økt munin í níggju stig undan sunnudegnum. Gaman í hava reyðu devlarnir spælt ein dyst meira, men við átta stigum hava teir altso vunnið sær eina leiðslu, sum sjálvt Mourinho man halda vera dekan ov trivalig.

## Úrslit, Premier League

| | |
|---|---|
| Man Utd.-Man City | 3-1 |
| Blackburn-Newcastle | 1-3 |
| Liverpool-Fulham | 4-0 |
| Middlersbr.-Wigan | 1-1 |
| Portsmouth-Everton | 2-0 |
| Tottenham-Charlton | 5-1 |
| Watford-Reading | 0-0 |
| Bolton-West Ham | 4-0 |
| Chelsea-Arsenal | 1-1 |

**Hondbóltsstøður**

**Sunset-kappingin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 7 | 5 | - | 1 | - | 1 | 178 | 141 | 37 | 11 |
| 2 Stjørnan | 7 | 5 | - | 0 | - | 2 | 170 | 140 | 30 | 10 |
| 3 VB | 7 | 4 | - | 0 | - | 3 | 159 | 170 | -11 | 8 |
| 4 Kyndil | 7 | 1 | - | 2 | - | 4 | 164 | 176 | -12 | 4 |
| 5 StÍF | 8 | 1 | - | 1 | - | 6 | 178 | 222 | -44 | 3 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 9 | 7 | - | 1 | - | 1 | 268 | 247 | 21 | 15 |
| 2 StÍF | 9 | 5 | - | 3 | - | 1 | 250 | 238 | 12 | 13 |
| 3 Neistin | 9 | 5 | - | 0 | - | 4 | 297 | 273 | 24 | 10 |
| 4 Kyndil | 9 | 3 | - | 0 | - | 6 | 249 | 248 | 1 | 6 |
| 5 KÍF | 9 | 2 | - | 1 | - | 6 | 232 | 255 | -23 | 5 |
| 6 H71 | 9 | 2 | - | 1 | - | 6 | 244 | 279 | -35 | 5 |

**Flogbóltsstøður**

**Meistaradeild kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 11 | 8 | - | 3 | 28 | 19 | 9 | 9 |
| 2 Dráttur | 11 | 8 | - | 3 | 27 | 19 | 8 | 9 |
| 3 TB | 11 | 7 | - | 4 | 25 | 14 | 11 | 8 |
| 4 SÍ | 11 | 6 | - | 5 | 23 | 20 | 3 | 6 |
| 5 KÍF | 11 | 2 | - | 9 | 17 | 27 | -10 | 2 |
| 6 Mjølnir | 11 | 2 | - | 9 | 9 | 30 | -21 | 2 |

**Meistaradeild menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 9 | 8 | - | 1 | 24 | 12 | 12 | 9 |
| 2 Mjølnir | 8 | 6 | - | 2 | 21 | 12 | 9 | 6 |
| 3 Fram | 9 | 4 | - | 5 | 16 | 20 | -4 | 4 |
| 4 Fleyr | 9 | 3 | - | 6 | 15 | 20 | -5 | 4 |
| 5 SÍ | 9 | 1 | - | 8 | 14 | 26 | -12 | 1 |

**Enska Premier League**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Man Utd. | 17 | 14 | - | 2 | - | 1 | 38 | 9 | 29 | 44 |
| 2 Chelsea | 16 | 11 | - | 3 | - | 2 | 26 | 9 | 17 | 36 |
| 3 Portsmouth | 17 | 8 | - | 4 | - | 5 | 23 | 14 | 9 | 28 |
| 4 Liverpool | 17 | 8 | - | 4 | - | 5 | 23 | 15 | 8 | 28 |
| 5 Bolton | 17 | 8 | - | 3 | - | 6 | 19 | 15 | 4 | 27 |
| 6 Arsenal | 16 | 7 | - | 5 | - | 4 | 26 | 13 | 13 | 26 |
| 7 Reading | 17 | 8 | - | 2 | - | 7 | 19 | 21 | -2 | 26 |
| 8 Tottenham | 17 | 7 | - | 4 | - | 6 | 20 | 21 | -1 | 25 |
| 9 Aston Villa | 16 | 5 | - | 9 | - | 2 | 19 | 15 | 4 | 24 |
| 10 Everton | 17 | 6 | - | 6 | - | 5 | 20 | 17 | 3 | 24 |
| 11 Wigan | 16 | 6 | - | 4 | - | 6 | 20 | 21 | -1 | 22 |
| 12 Man City | 17 | 5 | - | 5 | - | 7 | 14 | 20 | -6 | 20 |
| 13 Fulham | 17 | 5 | - | 5 | - | 7 | 16 | 27 | -11 | 20 |
| 14 Newcastle | 16 | 5 | - | 4 | - | 7 | 15 | 18 | -3 | 19 |
| 15 Middlesbr. | 17 | 4 | - | 5 | - | 8 | 14 | 22 | -8 | 17 |
| 16 Blackburn | 16 | 4 | - | 4 | - | 8 | 14 | 21 | -7 | 16 |
| 17 Sheffield Utd. | 16 | 4 | - | 4 | - | 8 | 11 | 20 | -9 | 16 |
| 18 West Ham | 17 | 4 | - | 2 | - | 11 | 10 | 24 | -14 | 14 |
| 19 Charlton | 17 | 3 | - | 3 | - | 11 | 13 | 28 | -15 | 12 |
| 20 Watford | 16 | 1 | - | 8 | - | 7 | 13 | 28 | -15 | 11 |

**Enska League One**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Nottm Forest | 21 | 13 | - | 5 | - | 3 | 30 | 15 | 15 | 44 |
| 2 Scunthorpe | 21 | 11 | - | 6 | - | 4 | 32 | 15 | 17 | 39 |
| 3 Bristol City | 21 | 11 | - | 4 | - | 6 | 27 | 19 | 8 | 37 |
| 4 Tranmere | 21 | 10 | - | 6 | - | 5 | 25 | 15 | 10 | 36 |
| 5 Oldham | 21 | 10 | - | 5 | - | 6 | 30 | 18 | 12 | 35 |
| 6 Yeovil | 21 | 9 | - | 7 | - | 5 | 25 | 19 | 6 | 34 |
| 7 Swansea | 21 | 9 | - | 5 | - | 7 | 29 | 24 | 5 | 32 |
| 8 Doncaster | 21 | 7 | - | 9 | - | 5 | 23 | 17 | 6 | 30 |
| 9 Carlisle | 21 | 8 | - | 6 | - | 7 | 23 | 23 | 0 | 30 |
| 10 Brighton | 21 | 9 | - | 3 | - | 9 | 29 | 31 | -2 | 30 |
| 11 **Blackpool** | 21 | 7 | - | 8 | - | 6 | 29 | 23 | 6 | 29 |
| 12 Port Vale | 21 | 9 | - | 2 | - | 10 | 28 | 28 | 0 | 29 |
| 13 Chesterfield | 21 | 7 | - | 6 | - | 8 | 28 | 28 | 0 | 27 |
| 14 Crewe | 21 | 8 | - | 3 | - | 10 | 37 | 38 | -1 | 27 |
| 15 Gillingham | 21 | 8 | - | 3 | - | 10 | 29 | 36 | -7 | 27 |
| 16 Bradford | 21 | 7 | - | 5 | - | 9 | 26 | 27 | -1 | 26 |
| 17 Hudddersfield | 21 | 6 | - | 7 | - | 8 | 25 | 31 | -6 | 25 |
| 18 Northampton | 20 | 5 | - | 8 | - | 7 | 15 | 20 | -5 | 23 |
| 19 Rotherham * | 21 | 9 | - | 5 | - | 7 | 33 | 27 | 6 | 22 |
| 20 Millwall | 21 | 5 | - | 6 | - | 10 | 20 | 31 | -11 | 21 |
| 21 Bournemouth | 21 | 4 | - | 8 | - | 9 | 19 | 30 | -11 | 20 |
| 22 Leyton Orient | 20 | 4 | - | 6 | - | 10 | 22 | 36 | -14 | 18 |
| 23 Cheltenham | 21 | 6 | - | 0 | - | 15 | 18 | 32 | -14 | 18 |
| 24 Brentford | 21 | 3 | - | 9 | - | 9 | 17 | 36 | -19 | 18 |

Føroyskir spælarar Claus Bech Jørgensen (Blackpool)

*) Rotherham byrjaði árið við 10 minusstigum. Hetta tí felagið er sett undir umsiting